**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

**um, at landsstýrið beinanveg fer undir samráðingar við Europasamveldið um fría atgongd til ES-marknaðin fyri føroyskar fiskavørur.**

## Viðmerkingar

Frá rávøru til matvøru

Føroyska samfelagið og fiskivinnan skulu fara frá at vera rávøruframleiðari hjá øðrum londum til at gerast matvøruframleiðari. Virðisskapan skal í hásæti, og útflutningsvirði Føroya eigur at verða tví- ella enntá trífaldað. Fyri at røkka hesum máli, má atgongdin til ES-marknaðin fyri føroyskar matvørur úr fiski verða frí, t.v.s. at verandi tollforðingar mugu takast av.

Tí verður skotið upp, at landsstýrið beinanveg fer í samráðingar við Europasamveldið um at fáa frían handil í lag, tó uttan at Føroyar missa ræði á sínum fiskiríkidømi ella fiskivinnupolitikki.

Tað er átroðkandi neyðugt at fáa fríari handil við ES í lag, tí júst hetta grundarlag má vera komið upp á pláss, tá ið ætlaði fiskivinnureformurin verður settur í verk 1. januar 2018.

Um fiskivinnureformurin skal sláa ígjøgnum og skapa øllum í Føroyum størri virði – samfelagskøkan til allar føroyingar skal vaksa – so má atgongdin til ES-marknaðin við sínum uml. 500 milliónum brúkarum vera heilt munandi betri enn í dag.

Fríur handil og ein nýskipað og kappingarfør føroysk fiskivinna eru lykilin til búskapar-vøkstur, økta vælferð og til at skapa øllum føroyingum, sum vilja búgva og virka í Føroyum, nýggjar virkismøguleikar og nýggj og góð arbeiðspláss í einum samfelagi, sum fer at standa í stórum vøkstri.

Handilsforðingar steðga matvørumenning í Føroyum

Føroyski búskapurin er tilfeingisbúskapur, sum kann sveiggja nógv, og tí tørva Føroyum fleiri bein at standa á vinnuliga. Framleiðslan má diversifiserast. Hetta kann m.a. gerast við at gera meira burturúr at tilvirka rávørutilfeingið í fiskivinnuni.

Meginparturin av føroyskari fiskaframleiðslu verður útfluttur til ES-marknaðin sum ótilvirkað vøra. Tí eru Føroyar ein týðandi rávøruveitari til fyritøkur í ES.

Ein forðing fyri at gera meira burturúr at tilvirka fiskatilfeingið og harvið skapa fleiri nýggj arbeiðspláss, eru handilsforðingar á ES-marknaðinum, har ið føroyskar fyritøkur skulu gjalda upp til 25% í tolli fyri at flyta tilvirkaðar fiskavørur á ES-marknaðin úr Føroyum sum upprunaland.

Hetta ber í sær, at føroyskar fiskavørur verða útfluttar meira ella minni sum primitivar vørur heldur enn matvørur á einum hægri framleiðslustøðið. Avleiðingin er, at Føroyar verða hildnar fastar í støðuni sum rávøruveitari hjá øðrum londum.

Missa arbeiðspláss av landinum

Møguleikin fyri at skapa fleiri og nýggj arbeiðspláss í fiskivinnuni á landi gleppur føroyskum fyritøkum av hondum. Serliga aktuelt er hetta fyri pelagisku vinnuna á landi, sum í løtuni ikki fær gjørt neyðugu íløgurnar í framleiðslu av tilvirkaðum pelagiskum fiskavørum.

Eitt av føroysku feløgunum hevur verið noytt til at steðga einari ætlan um eitt nýtt virki við hópin av nýggjum arbeiðsplássum, tí ES-tollurin tók fíggjarliga grundarlagið undan ætlanini. Árliga skuldu gjaldast meira enn 50 mió. kr. í tolli, og tá kundi ætlaða framleiðslan ikki standa seg í kapping við líknandi vørur á europeiska marknaðinum.

Onnur føroysk fyritøka hevur keypt virki í Týsklandi, so pelagiskur fiskur kann tilvirkast har. Harvið er eitt reiðarí í Føroyum rávøruveitari til eina føroyska fyritøku í Týsklandi, við føroyskari rávøru og við týskum starvsfólkum, gjaldandi skatt- og avgjøld til týska statskassan o.a. Betur hevði verið, um føroyska fyritøkan hevði møguleikan at havt líknandi virksemi í Føroyum uttan tollforðingarnar.

Hjá alivinnuni er eisini møguligt at gera meira við at tilvirka vørur, um marknaðar-atgongdin verður betri. Trupulleikarnir eru kortini mest eyðsýndir í fiskivinnuni.

Her sæst týðiliga, at tá ES-marknaðurin verður latin upp fyri fríum handli, opnast eisini hópin av nýggjum vinnumøguleikum í Føroyum.

Málið er at tvífalda útflutningsvirðið

Útrokningar, sum Sambandsflokkurin á Christiansborg lat gera í 2015, vísa, at fríur handil skapar stór virði hjá europeiskum londum við fiskivinnu.

Holland og Danmark eru tvey talandi dømi. Holland fiskar í nøgd ein triðjing minni enn Føroyar, men hollendski fiskavøruútflutningurin hevur umleið tríggjar ferðir størri virði enn tann føroyski. Danmark fiskar minni nøgdir av fiski enn Føroyar, men Danmark útflytir fisk fyri meira enn tríggjar ferðir størri virði enn útflutningsvirðið Føroya. Eisini keypa hesi lond fisk ella rávøru úr triðjalondum, sum tey tilvirka og selja víðari á fría marknaðinum.

Um Føroyar – við síni fyrsta floks rávøru í stórum mongdum – fáa marknaðaratgongd, ið líkist henni hjá Hollandi og Danmark, so kundi málið hjá komandi føroysku matvøru-vinnuni verið, í fyrsta umfari, at tvífaldað verandi útflutningsvirði, upp í einar 12 mia. kr. árliga. Harumframt kemur positiva ávirkanin á verandi og nýggjar avleiddar vinnur.

Frameftir má føroysk fiskivinna sostatt vera kappingarfør og eisini hava atgongd til somu møguleikar og ágóðar sum kappingarneytar í ES.

Partur av einum vinnuligum vakstrarpakka

Sum nevnt mælir Sambandsflokkurin til, at landsstýrið beinanveg fer undir samráðingar við ES um frían marknað. Høvið til at samráðast eigur at vera gott, eftir at Føroyar og ES nýliga gjørdu semju um býti av markel- og sildakvotum.

Landsstýrið eigur at skipa eitt fakligt samráðingartoymi, eisini við umboðum úr politisku skipanini og fiskivinnuni, ið skal hava uppgávuna at vinna Føroyum fría marknaðar-atgongd í ES.

Hetta uppskot til løgtingssamtykt er partur av einum vakstrarpakka, ið hevur til endamáls at betra vinnukarmarnar fyri okkara høvuðsvinnur umframt at beina burtur avmarkingar og forðingar fyri útflutningsvinnuna.

**Á Løgtingi tann 29. februar 2016**

**Sambandsflokkurin**

Bárður S. Nielsen, Magni Laksáfoss, Magnus Rasmussen, Edmund Joensen,
Kaj Leo Holm Johannesen og Bjørn Kalsø